


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi viðv. hesum feløgum:**

Nevnd og stjórn er farin frá.
Hesi feløg eru send Føroya Skiftirætti til tvingsilsavtøku 18. januar 2004 eftir § 87 jvb. § 86 í Sp/f-lógini.

Skrásetingar-nr. Sp/f 3117, **Sp/f Fregnir undir tvingsilsavtøku, 100 Tórshavn.**
Skrásetingar-nr. Sp/f 3434, **Sp/f Litmyllan undir tvingsilsavtøku, 100 Tórshavn.**
Skrásetingar-nr. Sp/f 3570, **Sp/f Rafik´sa Pizza undir tvingsilsavtøku, 350 Vestmanna.**
Skrásetingar-nr. Sp/f 3632, **Sp/f JN undir tvingsilsavtøku, 100 Tórshavn.**

Skráseting Føroya tann 18. januar 2005

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 3491,** P/F Faroe Seafood Processing Fuglafjørður, 530 Fuglafjørður.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Hákun Steingrímsson, Mikkjalstrøð 5, 100 Tórshavn (formaður), Jóhannes Jensen, Millum Gilja 111, 188 Hoyvík, Thomas Arabo, 416 Signabøur og Árni Arge, Torsteinsgøta 2, 188 Hoyvík.
**Innkomin í nevndina:** Óli Meinertsson Hansen, Skotarók 16, 100 Tórshavn (formaður), Leivur Dahl Michelsen, Hvannasundsgøta 4, 100 Tórshavn og Meinhard Jacobsen, Traðarbrekka 4, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Rógvi Pætursson Reinert, Inni á Fløtum, 180 Kaldbak.
**Innkomin sum stjóri:** Meinhard Jacobsen, Traðarbrekka 4, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya
tann 18. januar. 2005.

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 3670,** P/F Faroe Seafood Processing Hvalba, 830 Hvalba.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Hákun Steingrímsson, Mikkjalstrøð 5, 100 Tórshavn (formaður), Jóhannes Jensen, Millum Gilja 111, 188 Hoyvík, Thomas Arabo, 416 Signabøur og Árni Arge, Torsteinsgøta 2, 188 Hoyvík.
**Innkomin í nevndina:** Óli Meinertsson Hansen, Skotarók 16, 100 Tórshavn (formaður), Leivur Dahl Michelsen, Hvannasundsgøta 4, 100 Tórshavn og Meinhard Jacobsen, Traðarbrekka 4, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Rógvi Pætursson Reinert, Inni á Fløtum, 180 Kaldbak.
**Innkomin sum stjóri:** Meinhard Jacobsen, Traðarbrekka 4, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya
tann 18. januar. 2005.

Kristin Balle

# Lærari til Tofta skúla

Fyri lærara í barnsburðarfarloyvi verður hervið søkt eftir lærara í tíðaravmarkað starv frá 24. februar 2005 til 30. juni 2005.

Talan er um starv við fullum tímatali og umfatar:

- føroyskt í 7. fl.
- kristni í 7. fl.
- hondarbeiði í 7. fl
- heimkunnleiki í 4 fl.
- sang í 2., 3. og 4. fl.
- serligur tørvur

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 - 27.4.

Umsóknir skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi leygardagin 5. februar 2005.

Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at tosa við skúlastjóran, telf. 447332.

**Skúlastýrið fyri Tofta skúla**
v/ Jóhannus Danielsen
650 Toftir

**GSM telefonir**
Nokia - Siemens - Motorola
Ericsson - Panasonic
**Tráðleysar**
Siemens Dect.
Kunnu ikki avlurtast
**Til skip og bátar**
NMT 450 - VHF telefonir v.m.
**Storno** SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

# Kunngerð

Valevnislistarnir til fólkatingsvalið týsdagin 8. februar 2005 skulu vera formanninum fyri fólkatingsvalnevndini í hendi seinast fríggjadagin 28. januar 2005 kl. 18.00.

Sagt verður frá, at sambært vallógini skal valevnislistin vera undirskrivaður av valevninum við upplýsing um fult navn, føðingardag, starv og fullan bústað. Á valevnislistanum skal eisini verða upplýst navn og bústaður á einum veljara (tlf.), sum fólkatingsvalnevndin, umframt valevni, kann venda sær til, um villa er í valevnislistanum o.a.

Valevni, ið vil stilla upp fyri flokk (sum er umboðaður á Føroya Løgtingi), skal upplýsa hetta á valevnislistanum. Í seinasta lagi mánadagin 31. januar 2005 kl. 18.00 skulu flokkarnir boða fólkatingsvalnevndini frá, hvørji valevni flokkurin góðkennir. Fráboðanin skal fyri hvørt góðkent valevni innihalda upplýsing um navn, føðingardag og fullan bústað á hesum. Valevni, sum ikki verða góðkend av viðkomandi flokki, kunnu ikki stilla upp til valið. Um góðkenning ikki fyriliggur, kann einki valevni stilla upp fyri flokkin.

Valevni, ið stilla upp uttanflokka, skulu upplýsa hetta á valevnislistanum (tlf.). Valevnislistin skal eisini vera undirskrivaður av stillarum (av minst 150 og hægst 200 veljarum í Føroyum) við upplýsing um navn, føðingardag, starv og fullan bústað teirra.

*Tórshavn 19. januar 2005*

**Fólkatingsvalevndin fyri Føroyar**
**Olaf á Stongunum, fm.**
**í Brekkuni 9**
**Postboks 110**
**FO-110 Tórshavn**

**Tlf. 314691 ella 214691**

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!